## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og stundum kavi ella vátaslettingur. Um kvøldið minni vindur. Hitalagið millum ÷1 og +2 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, seinnapartin veksur hann vindin til hvassan vind. Stundum vátakavi ella regn og hitin millum Frostmarkið og +3 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og út á dagin regn. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi, sunnudagin minni vindur. Ælingur, partvís heglingur og hitin millum frostmarkið og 4 stig.

# Ísur á Sørvági



*Edvard Joensen*

Kuldin, sum verið hevur, hevur eisini verið at sæð aftur á sjónum, har stilt hevur verið. Eitt nú í bátahylinum í Sørvági, har hendan myndin varð tikin í seinastu viku.

Tað er ikki heilt óvanligt, at tunnur ísur kann leggjast á sjógvin, har stilt er, vita føroyingr frá at siga, hóast vit ikki hava somu trupulleikar av ísi, sum eitt nú inni í Eystursjónum og har um vegir.

Petur Skeel Jacobsen, veðurmaður á Sosialinum, sigur, at tað velst eisini nógv um saltinnihaldið í sjónum, um tað fyrstir ella ikki.

Eitt nú í báthyljum, har kanska ein á ella tvær renna í, verður mongdin av feskum vatni tað meira, og tí frystir skjótari.

Verður vanligi sjógvurin kaldari enn fýra hitastig, broytist vektfyllan í sjónum ikki, og tann kaldi sjógvurin søkkur ikki og blandast tí heldur ikki við tann heitara sjógvin djypri niðri. Sostatt frystur hann skjótari, greiðir veðurmaðurin frá.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷10 |
| Nuuk | ÷5 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | ÷13 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | ÷7 |
| Seyðisfjørður | ÷4 |
| Tórshavn | ÷2 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 11 |
| Tromsø | ÷8 |
| Bergen | 6 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | – |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | ÷1 |
| Moskva | ÷3 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 5 |
| Kiev | 6 |
| Bukarest | 12 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 15 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 6 |
| New Dehli | 16 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 26 |
| Sydney | – |
| New York | 15 |
| Miami | – |
| Los Angeles | 11 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 34 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 981 hPa. í útsynning úr Íslandi fer eystureftir og brúgvalagið verður við Føroyar mikudagin.




Lágtrýstið við Hvarvið stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani fer norð um Føroyar fríggjadagin við lýggjari veðri.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 28/01 kl. 06⁰⁰– 29/01 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 0,1°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 28/01 kl. 06⁰⁰– 29/01 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í januar: 172,1 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

28. januar: Fullmáni
30. januar: Mánin næstur jørðini
4. februar.: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30. jan | 07.41 | 20.08 | 06.41 | 19.08 | 06.56 | 19.23 | 09.41 | 22.08 | 10.41 | 23.08 | 05.56 | 18.23 | 04.56 | 17.23 | 07.56 | 20.23 | 08.56 | 21.23 | 07.26 | 19.53 | 08.41 | 21.08 |
| 31. jan | 08.35 | 21.02 | 07.35 | 20.02 | 07.50 | 20.17 | 10.35 | 23.02 | 11.35 | — | 06.50 | 19.17 | 05.50 | 18.17 | 08.50 | 21.17 | 09.50 | 22.17 | 08.20 | 20.47 | 09.35 | 22.02 |
| 1. feb | 09.30 | 21.54 | 08.30 | 20.54 | 08.45 | 21.09 | 11.30 | 23.54 | 00.02 | 12.30 | 07.45 | 20.09 | 06.45 | 19.09 | 09.45 | 22.09 | 10.45 | 23.09 | 09.15 | 21.39 | 10.30 | 22.54 |
| 2. feb | 10.18 | 22.41 | 09.18 | 21.41 | 09.33 | 21.56 | — | 12.18 | 00.54 | 13.18 | 08.33 | 20.56 | 07.33 | 19.56 | 10.33 | 22.56 | 11.33 | 23.56 | 10.03 | 22.26 | 11.18 | 23.41 |

5 707265 100036 >